Viðmerking:

# Zen og kunsten at være statsleder!

– Vi har klaret det. Det bliver bedre fra nu af. Sådan noget ved man bare! (R. M. Pirsig. amr. filosof)

Buddhismen, og især zenbuddhismen, har en noget diffus og forfriskende uhøjtidlig indfaldsvinkel til metafysiske hardcore-spekulationer og diverse teser og antiteser om nødvendigheden af det eviges eksistens. Måske deraf den store interesse, vestens intellektuelle altid har vist denne østens perle udi det mentalhygiejniske.

Nu ved jeg ikke, om den ypperste repræsentant for Syddannmarks intellektuelle, den yderst velopdragne og hemmningsløst sofistikerede statsminister Poul N. Rasmussen, har flirtet med noget så kinky som østens religioner. Næppe. Hans indremissionske rødder in mente.



Nyrup Rasmussen er dog overraskelsernes mand. Ingen tvivl om det. MEN når først overraskelserne er blevet en fast forankret ingrediens i den politiske hverdag, er disse ikke længere for overraskelser at regne, men snarere noget helt andet. Som begynder med "d", og ender med "hed"...

Igennem hele sin regeringstid, har Nyrup mesterligt lavet den ene latterlige bommert efter den anden.

Og nu, som den forløbigt sidste af slagsen: den forplumprede og ufolkelige behandling af den færøeske delegation, der drog ned til det syddanske i én overordnet hensigt – AT få den, af danskerne selv, så berømmede solidariske, altid etisk-orienterede og noget så menneskevenlige, danske regering i tale! Denne repræsentation for det ypperste i folkestyrets velsignelser; denne manifestation af elyseisk herlighed og paradis på jord: den syddanske regering og i dens kølevand – det socialdemokratiske samfund.

Ned til alle disse fortræffeligheder kom der en dag en delegation fra de små, stormsumsuste Færøerne. Hvad de ville? Jo, forhandle med den danske regering om en nedsættelse!!!! af den økonomiske ydelse, Syddanmark årligt pumper ind i den færøske samfund.. Og om en suveræn færøsk stat. Det skulle da være guf for de altid politiskt korrekte danske socialdemokrater! Hvor var de ikke fortørnede – sammen med de borgerlige – dengang daværende Sovjetunionen truede de baltiske landes selvstændighedstrang. Og hvor var de dog glade og velfornøjede – alle disse skandinaviske solidaritetseksperter – da imperialismens åg blev kastet, og frihedens tøjleløse solstråler beskinnede det afrikanske kontinent!

Men nu er det slut med Sofies kærlighed! Syddanmarks populære statsminister, der har givet ordene "arrogance uden substans" et helt nyt indhold, slår nu næven i bordet!. Nu skal den muntre søn fra det ramsaltede vestjyske indremissionske, rigtigt vise dem! Nu skal alle de andre indensom udenrigspolitiske fiaskoer i glemmebogen. Statsministeren vejrer morgenluft. En letkøbt sejr over de ødsle gullashbaroner i det nordatlantiske! Til formålet bestilte redegørelser fra Finansministeriet om udgifter af færinger, der er bosatte i det syddanske, bliver loyalt genfortalt af papegøjerne i de danske medier! Diverse aviser laver folkeafstemmning via Internettet! Et sus af sammenhold svejser pludselig hele det politiske spektrum i Danmark sammen. Sovs og frikadeller! Og det er et yndigt land!

Men hvad er det så, Nyrup Rasmussen har opnået? En Phyrrussejr af dimensioner! Oppe på Færøerne kommer hans tro følgesvende – de solidariske mennesker i den Socialdemokratiske pendant på Færøerne, Javnaðarflokkurin – i vanskeligheder. For at sige det mildt. Fordi den geniale streteg, Poul N. Rasmussen, åbenbart fuldstændigt har forregnet sig i forhold til den færøske nationalkarakter. Fra nu af står den på sammenhold oppe i det færøske!

Nyrup har gjort det igen! Dummet sig, altså!! Og vi der ønsker Fullveldi_, må være ydmyge nu! Og takke denne mærkelige danske statsminister for hjælpen! Det er sandelig en kunst at være statsleder. Og Nyrup Rasmussen kan den altså ikke!

**Jens Chr. Carlsson**
**Torshavn**
**Færøerne**

# Hjálptu danir føroyingum í 1992?

*Hatta hendi í 80-unum! Soleiðis gekk tað fyri seg í teimum villu 80-unum – tá bar alt til. Henda málburð kenna vit øll*

Nakað soleiðis verður at kalla dagliga tikið til, tá hugsa verður um peningaoyðsl, spekulatión, húsagangur og endurreisn av somu feløgum, alment veðhald o.s.fr. Alt hetta fór fram í 80-unum, tá uppgangstíðir vóru her á landi og fólk høvdu nógvan pening. Tað verður bara at brúka. Ábyrgd var eingin, hvørki hjá tí meiniga manninum ella politikarunum, tí hon lá í einum øðrum landi. Hetta er tað sum sambandsmenn í dag kalla fyri eitt trygdarnet. Alt hetta fór fram undir heimastýrislógini, sum ikki er annað enn ein gummilóg, sum varð trýst niður yvir føroyska fólkið, sum ongantíð fekk loyvi at taka støðu til hesa ódemokratisku lóg.

Donsk fíggingarfeløg tevjaðu pengar her og buðu seg fram at læna pening og at fíggja stórar bygningar o.a. Tá so kreppan kom, og ikki var orka at rinda rentur og avdrøg til hesar lánveitarar, sum høvdu verið so fittir og lagaligir, fóru teir at kenna sviðan av hesum. Nú skuldu vanligu spælireglarnar ikki longur galda, so fyri at sviðin ella missurin ikki skuldi verða ov stórur, fingu hesir fittu »bjargingarmenn«, sum komu higar aftur og koyrstu danskar loysnir niður yvir høvdið á okkum, borið tað so í bandi, at øll henda privata skuld, sum nevndu donsku fíggingarfeløg áttu at tikið á seg, varð koppað inn í føroyska landskassan, við teimum ræðuligu fylgjum, at tað varð meinigi føroyingurin, sum nú knappliga stóð við allari skuldini – tær syndarligu avleiðingarnar kenna vit øll. Hetta var helst ein av loysnunum, sum sambandsflokkurin rópti upp um undan síðsta vali.

Samstundis tók danska stjórnin alla uttanlandaskuld okkara uppá seg við okursrentu. Hetta er tað sum formaður sambandsfloksins hálovaði í Fimmaranum 8. mars. Jú, hesin vísmaður hevði eisini funnið útav, at føoyingar høvdueir aat siga í Danmark enn dansir sjálvir – sig so tað. Hann sum fór til Danmarkar á sinni, at fáa teir at taka bankaskuldina uppá seg, tí hetta var danska málsøki, men kom ístaðin heimaftur ongul í reyv við 100 mill. í øktari lánibyrðu til føroya fólk. Hann var bara heilt stuttligur og hevði helst egna seg betur at luttikið í sendingini sum plagar at koma aftaná, har kundi hann so billa Gísmundi alt møguligt inn.

Ikki fyrr enn sitandi samgonga tók við, eydnaðist at fáa skil á skuldini, har rentan m.a. kom niður á eitt marknaðarrættvíst støði. Somuleiðis eydnaðist tað eisini at fáa eina avtalu um markið við bretar undir hesi samgongu. Sjálvandi er tað fyrst og fremst teimum dugnaligu samráðingarfólkunum (hóast tað ikki vóru danir) at takka fyri. Sostatt beri eg ongan ekka nú samgongan fer niður at samráðast um framtíðar støðu okkara, tí hetta eru dugnalig og seriøs fólk, sum eg havi stóra virðing fyri.

Samanumtikið, so hjálptu danir ikki okkum í 1992, men heldur teimum donsku fíggingarfeløgunum, og sínum egna umdømi uttanlands. Tað einasta land, sum hevur latið okkum nakað fyri einki er Ísland. Teir hava ikki latið við aðrari hondini fyri at eyðræna fleirfalt aftur við hinari. Vónandi kunnu vit løna teimum tað aftur, um olja verður funnin á okkara leiðum.

Eitt svitast ikki, at tað er einans heimastýrislógini fyri at takka, at støðan gjørist sum hon gjørdist, tí vit vóru ómynduggjørd við hesi ódemokratisku lóg, har ábyrgdin lá í einum fremmandum landi.

**Kai Vágfjall**

## Ferðaleiðarafelagið havt aðalfund

Føroya Ferðaleiðarafelag hevði aðalfund leygardagin 11. mars, har tveir nýggir nevndarlimir vórðu valdir og ein eykalimur.

Aftaná aðalfundin hevur nevndin skipað seg soleiðis:

Hilda Thomsen, formaður
Jóhanna Traustadóttir, næstformaður
Anna Elena Skaalum, kassameistari
Jóhanna Hansen, skrivari
Bette Johansen, varaskrivari

Eykalimir eru nú: Gunhild V. Michelsen og John Eysturoy

Lesið eisini Sosialin á Internetinum

www.sosialurin.fo

# Tann stóri munurin

Hetta vil samgongan:
Samgongan vil minka um ríkisstuðulin við fyrst at loysa – t.v.s. taka Føroyar úr ríkinum.

Men hóast vit tá vera uttan fyri danska ríki, krevur samgongan kortini, at danir skulu gjalda okkum ríkisstuðul í eini skiftistíð, sum helst skal vera so long, sum gjørligt.

Samgongan krevur sostatt, at hon einsamøll, á øllum økjum, **skal valda, meðan danir bert skulu gjalda, og annars tiga**. Teir skulu als ikki hava nakað at siga á teimum økjum, sum teir gjalda fyri.

Slíkar ætlanir eru olmussupolitikkur, tá ið hann er bestur.

Hetta vilja Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin:

Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin vilja heldur gera neyðugar broytingarnar í verandi ríki, soleiðis at ríkisstuðulin minkar í góðum samsvari við øktari menning her heima.

Ein slík stuðulsbroyting, sum er ein fylgja av framhaldandi menning av okkara sjálvberandi figgjarorku, er ein nógv greiðari, tryggari og eisini ein meira sømulig skipan, sum hevur breiða undirtøku millum føroyingar og danir.

**Óneyðugt at loysa**
Eg taki fult undir við uppskotinum, sum Eilif Samuelsen fyrr hevur nevnt í pressuni, um longu í ár, at yvirtaka og gjalda alt skúlaverkið.

Henda yvirtøka kann gerast við eini skiftistíð, **sum vit sjálvi áseta**, og neyðugt verður ikki at loysa úr ríkisfelagsskapinum, fyri at fremja hana.



**Tórshavn 20. mars 2000**
**Trygvi F. Guttesen**

# Frigørelse fra Danmark

Jeg forstår som dansker udmærket, at Færøerne har lyst til at være uafhængig af Danmark.

Når det er sagt, så irriterer det mig, at færingerne ønsker, at vi danskere - hvoraf nogle af os betaler 68% i skat, 25% moms på alle varer, 200% afgift på en ny bil, høje benzinpriser, beskatning af lejeværdi af egen bolig samt yderligere en årlig ejendomsskat der i mit tilfælde beløber sig til over 30.000 kr. årligt, samt mange andre afgifter - dels skal eftergive færingerne milliard gæld til Danmark og dels fortsat i en lang årrække støtte med over en milliard.

Færingerne burde skamme sig over sådanne krav. Ønsker man selvstændighed, så OK, men vær dog voksne og tag selv konsekvenserne, i stedet for at vi andre skal financiere jeres velstand, det er dog for egoistisk. Tænk jer lidt om inden i fremsiger urimelige påstande. Jeg så jer gerne fri af Danmark, så vi danskere kunne spare nogle penge og ikke længere udråbes som landet med det største skattetryk.

Løsriv jer - men betal selv gildet, så er vi nogen der ville respekterer jer.

**Med venlig hilsen**
**Jørgen Andersen**



# Hálvt ár at fáa barninum stól

*– Eg føldi meg øgiliga einsamalla í mínum arbeiði, og øll arbeiða hvør í sínum lagi, sigur Ásvør Joensen, sum er stuðul hjá einum brekaðum barni í Havn*

Áki Bertholdsen

–Eg føldi meg øgiliga einsamalla, tí tann sosial og fakligi parturin manglaði. Og hvør arbeiðir í sínum lagi, uttan at tað er samskipað.

Hetta var í stuttum niðurstøðan hjá Ásvør Joensen á økisfundinum hjá Javna mánakvøldið.

Ásvør hevur verið stuðul hjá børnum í Havn í seks ár, hon er ikki pedagogur.

Á fundinum greiddi hon frá, hvussu hon helt, at umstøðunrar hjá stuðlunum vóru og tað skiltist á henni, at tað er nógv, sum kundi verið betri.

Hon hevur verið stuðul hjá illa brekaðum børnum, uttan í tí eina førinum.

Hon byrjaði sum stuðul hjá einum 2 1/2 ára gomlum drongi.

–Í slíkum førum er tað ikki bara barnið, men alt húskið, sum mann má laga seg til.

Ásvør segði, at tað er ringt hjá einum húski at hava fremmant fólk rundan um seg ein part av degnum, tí tey vilja sjálvandi royna at skapa sær ein vanligan gerandisdag so vítt sum tað ber til.

–Men sum stuðul er tað eisini trupult at fara heim til eitt húski og vera har. Mann er noyddur at skapa sær sjálvum og barninum eitt innihald í degnum

Ásvør segði, at drongurin, sum hon nú hevði, hevði hon havt heima hjá sær sjálvum í fleiri ár, saman við hennara egna húski.

– Hann var trý ár tá ið hann byrjaði hjá mær og tað riggaði væl. Hann bleiv ein partur av okkara húski.



*– Tað er ørkymlandi, at vit skulu arbeiða undir tveimum ymsum stuðulsskipanum, bæði teirri hjá Tórshavnar Kommunu og teirri hjá Almannastovuni, tí reglarnar eru ymiskar, sigur Ásvør Joensen, sum er stuðul hjá brekaðum barni í Havn. Herborg Nyholm Debes, sum arbeiðir hjá stuðulsskipanini í Havn, lýðir á*

**Hálvt ár fáa ein stól**
Tó ásannaði Ásvør, at hon føldi seg øgiliga einsamalla í arbeiðnum.

–Bæði tann sosiali og fakligi parturin manglaði.

– Eg royndi at geva honum góð upplivilsir. Men tað bæði var, og er ov tungt og ov leingi at fáa tey hjálpitól, sum brúk er fyri.

– Eitt nú tók tað eitt hálvt ár at fáa ein innistól til drongin. So antin mátti eg nana honum, ella mátti hann liggja á eini madrassu á gólvinum, greiddi Ásvør frá.

**Var ikki tað rætta**
Ásvør Joensen segði, at aftaná tvey ár fekk hon hug til at royna okkurt nýtt og tá fekk hon boðið arbeiðið sum stuðul hjá eini seks ára gamlari gentu í barnagarði.

– Tað fekk ikki so gott, tí har fekk eg beinanvegin at vita, at tað ein pedagog, tey høvdu biðið um, so eg var ikki rætta fólkið.

Ásvør sigur, at hetta merkti hon alla tíðina og aftaná tríggjar mánaðir segði hon upp.

– Stutt aftaná fekk hon aftur tilboð um at vera stuðul hjá sama drongi, sum hon hevði havt frammanundan.

**Góð hús men ringar umstøður**
Stuðulspedagogurin greiddi somuleiðis frá, at 1. september í fjør læt frítíðarskúli upp í Bridgehúsinum í Havn fyri børnum úr 1. og 2. flokki av Sernámsdeplinum.

– Vit eru seks stuðlar og seks børn. Tað er frálíkt at vit hava fingið eitt hús, sum vit kunnu kalla okkara arbeiðspláss og at hava fingið onnur starvsfólk at vera saman við.

– Hølini eru góð til endamálið, tí har eru ongar trappur og nógv gólvpláss, og tað kemur væl við, tí taðeru nógv børn, sum sita í rullustóli.

–Men vit eru í leigaðum hølum og tað merkir, at vit fáa ikki innrætta okkum, sum vit hava hug til. Hølini verða brúkt til bridge um kvøldið so eftir hvønn arbeiðsdag má alt ruddast burtur og beinast av vegnum. Og tað er er strævið, tí summi børn hava hjálpitól, ið eru tung at fáast við og sum krevja nógv pláss.

Ásvør Joensen vísti á, at nógv ymisk fólk eru knýtt at dronginum, sum hon er stuðul hjá.

Fyri tað fyrsta er hann heima. Men hann er eisini í skúla fyrrapart, og í frítíðarskúlanum seinnapart, har hon hevur hann.

–Harumframt gongur hann til ríðing tvær ferðir um vikuna og til fysioterapi einaferð um vikuna. Og harafturat er hann á Frítíðarheiminum í Skrivaragøtu eitt vikuskifti um mánaðan, og tá ið tørvur annars er á tí.

– Men tað, sum manglar, er at fáa alt hetta samskipað.

– Tað er ikki samskipað sum er, tí nú arbeiða øll, sum eru um drongin, hvør í sínum lagi.

Hon segði, at hon hevði ynskt, at øll tey, sum hava við drongin at gera, kundu samskipa sítt arbeiði.

–Á henda hátt høvdu vit fingið eina størri heild í arbeiðið og høvdu kunna sæð drongin sum eitt heilt fólk.

Hon segði, at eftir hennara tykki er tað Almannastovan, sum í hesum eigur at samskipa eitt slíkt arbeiði.

**Tvær skipanir**
Annars vísti Ásvør á, at stuðlarnir arbeiða undir tveimum ymsum skipanum og at tað er rættiliga ørkymlandi.

Í fyrra lagi er tað talan um stuðulsskipanina hjá Tórshavnar Kommunu og í øðrum lagi er tað talan um Almannastovuna.

Sjálv hevði hon arbeitt undir skipanini hjá Tórshavnar Kommunu í tvey og eitt hálvt ár, inntil drongurin, sum hon hevði, fór undir Almannastovuna.

– Hetta er eitt sindur ørkymlandi, tí tað er ymsar og ógreiðar reglar at ganga eftir. Stuðlarnir í Bridgehúsinum eru eisini undir ymsum skipanum, tríggir eru undir kommununi og tríggir undir almannastovuni, segði Ásvør Joensen.

# Alt skal endavendast

*Fólk skal nú setast til at standa fyri einum umfatandi arbeiði at lýsa stuðulsfólkaskipanina, sum leingi hevur verið fyri atfinningum*

Áki Bertholdsen

Nú skal skjøtil setast á eitt mál, um øll, ið fáast við Sosialt arbeiðið í Føroyum, leingi hava trákkast eftir.

Og tað er arbeiðið at kanna og broyta stuðulsfólkaskipanina.

Tað eru rættiliga nógv fólk kring alt landið, sum eru stuðlar hjá børnum og vaksnum, sum onkusvegna eru illa fyri, tað verið seg av breki, menningartarni ella av sosialum orsøkum.

Men sum Ásvør Joensen greiðir frá omanfyri, er tað nógv í hesi skipanini, ið ikki virka nóg væl og tað hevur eisini leingi verið væl kent, at tey, sum hava við skipanina at gera, antin sum starvsfólk, ella sum brúkarar, halda ikki, at hon virkar nóg væl.



*– Hetta er eitt sera stórt og umfatandi arbeiði, so tað verður ikki gjørt í eini handavending, segði Helena Dam á Neystabø*

Men á fundinum, sum Javni skipaði fyri mánakvøldið, greiddi Helena Dam á Neystabø, landsstýrismaður í Almanna og heilsumálum frá, at nú er hol sett á arbeiðið at endavenda hesi skipanini.

Hon segði, at í næstum verður ein projektleiðari settur til at endurskoða alla stuðulsfólkaskipanina, sum hon er.

– Endamálið við hesum arbeiðnum er sjálvandi at fáa eina nágreiniliga lýsing av, hvussu stuðulsfólkaskipanin virkar í dag. Men endamálið er eisini at taka støðu til, um lógarheimildirnar eru ílagi.

Hetta segði hon, tí løgfrøðingar hava leingi ivast í, um lógarheimild yvirhøvur hevur verið til at útbyggja hesa skipanina so nógv, sum hon er útbygt.

Landsstýrismaðurin segði, at endamálið við arbeiðnum er eisini at gera tilmæli um, hvussu vit kunnu fáa skipanina at virka betur.

– Í hesum sambandi hugsa vit fyrst og fremst um, hvussu vit tryggja eitt nóg fjølbroytt, fakligt grundarlag til at veita ein stuðul, sum er nøktandi, tí vit tosa um fólk, við ógvuliga ymsum brekum og sosialum fortreytum og tískil eisini við ógvuliga ymiskum tørvi.

Helena Dam á Neystabø sigur, at saman við projektleiðaranum, skal eisini ein stýrisbólkur setast og tá ið farið verður til verka, verða sjálvandi avvarandi feløg og stovnar spurd til ráðs.

Hon segði, at hon vónaði ikki, at arbeiðið fór at taka alt ov langa tíð.

– Men hetta er eitt sera stórt og umfatandi øki so vit skulu ikki fyrigykla okkum, at hetta verður gjørt í eini handavending.

Tískil er útvið eitt ár sett av til arbeiðið.

## Økisfundir hjá Javna

Hesi seinastu árini hevur Javni hvørt ár hildið økisfundir kring landið, har ymisk evni hava verið til viðgerðar, sum hava samband við umstøður og viðurskifti hjá menningartarnaðum og brekaðum í Føroyum.

Hvørt ár eru tað ávis evni, sum hava verið á skránni.

Økisfundirnir í ár vóru mánakvøldið og hesuferð var tað Stuðulsskipanin, sum var til viðgerðar.

Tað, sum Javni vildi seta ljóskastaran á, var, um stuðulsskipanin virkaði nóg væl umsitingarliga, eins væl og fyri brúkaran, foreldrini, fyri stuðulin sjálvan, umframt fyri politikaran.

Sosialurin var við á fundinum í Havnini, her flestu stuðlarnir natúrliga eru, av tí, at her býr flest fólk.

Á fundinum í Havn fekk eisini Helena Dam á Neystabø, landsstýrismaður í almanna og heilsumálum høvi at greiða frá politisku ætlanunum á økinum.

Annars var fundurin skipaður sum pallborðsfundur.

Við pallborðið sótu, umframt landsstýrismannin, eisini Jórun Dánjalsdóttir Poulsen, foreldur, Ásvør Joensen, stuðul, Herborg Nyholm Debes, sum arbeiðir í umsitingini hjá stuðulsskipanini í Havn og Ragnhild Dahl á Almannastovuni.

Orðstýrari var Øssur Winthereig.

Vit fara í blaðnum í dag og í morgin at tríva í sumt at tí, sum var ført fram á fundinum.

Á fundinum vóru fleiri, vónbrotin av, at ikki ein einasti býráðspolitikari í Havn var við á fundinum.

*–Áki–*